# Fuglafjørður tók tað mesta



*Unglingameistarakappingin í Svimjing varð hildin í Klaksvík um vikuskiftið*

*Mynd: Bárður Lydersen*

SVIMJING

*Jákup Mørk*

Fuglafjarðar Svimjifelag vann ikki færri enn 43 gullmerki, tá unglingameistarakappingin varð svomin um vikuskiftið.

Kappingin gekk fyri seg í Klaksvík, har hópur av svimjarum úr øllum landinum høvdu sett hvørjum øðrum stevnu.

Sum skilst á fyrireikarunum, so gekk væl at avgreiða kappingina.

Eitt einstakt føroyskt met var sett, og var tað Jutta Thomsen av Tvøroyri, sum setti hetta í 400 metra frí.

Mest vinnandi svimjarin var annars Natalia Reinar úr Ægir. Hon vann ikki færri enn 16 gullmerki. Elspa Mørkøre úr Fuglafjarðar Svimjifelag vann hesaferð 15 gullmerki.

Hjá mansunglingum tók Jákup Øssurson Mohr sær av 13 gullmerkjum, meðan Høgni Miné-Rasmussen vann 10 kappingar.

Samlaða býtið av heiðursmerkjum millum feløgini var annars hetta:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fuglafjarðar Svimjifelag | 43 | 17 | 10 |
| Havnar Svimjifelag | 26 | 19 | 18 |
| Ægir | 17 | 10 | 1 |
| Vágs Svimjifelag | 10 | 12 | 7 |
| Flot | 6 | 19 | 12 |
| Tvøroyrar Svimjifelag | 4 | 18 | 16 |
| Skeggjar | 1 | 13 | 5 |
| Reki | 0 | 1 | 2 |

# FH tók Atlants-bikarið

HB spældi sunnudagin móti íslendsku meistarunum úr FH í dysti um sonevnda Atlantic-steypið. Hetta er dysturin millum meistararnar úr Íslandi og Føroyum, og varð dysturin í ár leiktur í Íslandi.

Í fjør vann HB tilsvarandi dystin móti KR, men í ár gekk tó ikki hjá føroysku meistarunum. FH vann ein tryggan 4-1 sigur, eftir at støðan í steðginum hevði veð 2-0. Einsamalla máið hjá HB skeyt Emil Nolsøe Leifsson, tá hann við frálíkum langskotið minkaði munin til 4-1.

Millum teir 350 áskoðararnir, sum vóru til dystin, vóru á leið 30 viðhaldsfólk hjá HB, sum høvdu tikið av tilboðnum hjá felagnum um at keypa sær pláss á ferðini.

-jm


Sosialurin
Sosialurin
i

TIL SØLU



**Sethúsini Landavegur 31 (við Debesartrøð), matr 1028 Tórshavn**

Húsini eru í 3. hæddum við trimpli og kvisti.
Hvør hæddin er umleið 65 m². Grundøkið er 450 m².
Miðhædd: durur/hjallur, gongd, baðirúm, køkur, 2 stovur.
Loft: 4 kømur, baðirúm, lítið goymslurúm.
Kjallarahædd: trappuniðurgongd, kamar, WC við hondvaski, vaskirúm og hjallararúm.
Húsini liggja miðskeiðis í býnum í sera friðarligum og veðurgóðum umhvørvi.
**Verða seld um hóskandi boð fæst.**

***Tlf 313031 og tlf 219100 eftir kl 15.00***

Sosialurin 341800

FAROE LAW

Faroe Law bjóðar heimligar og altjóða loysnir

*Tosið við:*

**Eyðfinn Jacobsen advokat**

**Jens Wang advokatfulltrúa**

Tróndargøta 19
P.O.Box 1218
FI-110 Tórshavn
tel 359 900 - fax 359 901
mobil 219 902 - 219 903
faroe-law@faroe-law.fo

www.faroe-law.fo

Sosialurin

## Eysturoyar fólkafloksfelag

Aðalfundurin sum var lýstur at verða týskvøldið 26. apríl er fluttur til mikukvøldið 27. apríl kl. 19.30 á Restaurant Muntra í Fuglafirði.

**Eysturoyar Fólkafloksfelag**

LEIGA AMBOÐ & MASKINUR

Kaj Andreasen & Co
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00


## Fráboðan um umhvørvis-góðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 21. apríl 2005, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 grein 1, stk. 4, hevur góðkent

**Brennistøðina hjá Tórshavnar kommunu á Sandvíkarhjalla**

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til landsstýrismannin í umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2. hædd, FO-100 Tórshavn, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato. Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo

**Heilsufrøðiliga starvsstovan**

## Fráboðan um umhvørvis-góðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 21. apríl 2005, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 grein 1, stk. 4, hevur góðkent

**Brennistøðina hjá IRF á Hagaleiti í Leirvík**

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til landsstýrismannin í umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2. hædd, FO-100 Tórshavn, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato. Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo

**Heilsufrøðiliga starvsstovan**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 3682,** P/F SeWave, 210 Sandur.
**Viðtøkur broyttar:** 22.04.2005
**Partapeningur:** Hækking við kr. 1.600.000,00 til kr. 2.100.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 1.600.000,00 til kurs 100.

Skráseting Føroya
tann 21. apríl 2005

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 448,** Sp/f Verkfrøðingastovan, 100 Tórshavn.
**Partapeningur:** Viðtikið tann 18.02.2005 at lækka partapeningin við kr. 1.000,00 til kr. 299.000,00 tl kurs 100, til útgjaldingar til partaeigarar, eftir at proklama er runnið.

Skráseting Føroya
tann 21. apríl 2005

Kristin Balle